## Aller selir bløð

Forlagið Aller hevur gjørt av at gevast við at geva út fakbløð og hevur nú lýst tey seinastu fakbløðini til sølu. Talan er um Dagbladet Licitationen, Transportmagasinet, Motormagasinet og Nyhedsinformation. Fyritøkan sigur, at hon hevur valt at gevast við fakbløðum, tí marknaðurin er minkaður so nógv. Frammanundan hevur fyritøkan selt fakbløðini Jern- og maskinindustrien og Mestertidende. Ístaðin fyri ætlar Aller at miðsavna sítt virksemi um færri og størri øki so sum byggivinnuna, bilvinnuna og heilsuøkið.




## Smuglaði makrel

Tollararnir á markinum millum Noreg og Svøríki fingu ein heldur sjáldsaman fong í síðstu viku, tá teir funnu ikki minni enn 720 kilo av makreli í viðførisrúminum á einum bili. Kvinnan, sum átti bilin, segði, at makrelurin var keyptur í Noregi til ein vin í Gøteborg. Nú hevði hon so verið í Gøteborg, men av tí at vinurin ikki var heima, hevði hon tikið makrelin við sær aftur til Noregs. Men av tí at hon ikki hevði tollavgreitt makrelin, misti hon alt og skal harafturat rinda bót, skrivar Aftenposten.

# Fáur trýr uppá samanlegging eftir einum ári



*Tað eru serliga tær smærru kommunurnar í landinum, sum eru limir í Føroya Kommunufelag. Minsta kommuna í KSF, Kommunusamskipan Føroya, er Sands kommuna*

**- Vit vóru samd um at geva landsstýrinum frið at viðgera uppskotið. Vit halda, at eindirnar mugu vera størri, enn tær eru í dag, um kommunurnar skulu verða førar fyri at átaka sær størri uppgávur sum eitt nú fólkaskúlan og eldraøkið, sigur formaðurin í Føroya Kommunufelag eftir fund um tilmælið um nýggjan kommunureform**



*- Stórur ivi er millum limakommunurnar í Føroya Kommunufelag um, hvørt ein samanlegging letur seg gera so skjótt, sum arbeiðsbólkurin skjýtir upp, tí tað verður nógv, sum skal fáast upp á pláss, áðrenn nøkur samanlegging kann fara fram, sigur Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya Kommunufelag*

KOMMUNUTILMÆLI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya Kommunufelag viðgjørdi á fundi mikudagin tilmælið hjá arbeiðsbólkinum, sum landsstýrið setti at gera uppskot um ein nýggjan kommunureform.

Arbeiðsbólkurin skjýtir upp, at kommunalu eindirnar í Føroyum verða sjey ella níggju í tali. Hesar skulu skipast 1. januar í 2011, og kommunuval skal verða longu 9. november í 2010 – ella um eitt gott ár.

### Fleiri uppgávur

Sambært tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum skal fólkaskúlin flytast út til kommunurnar at umsita frá 1. januar í 2012 og eldraøkið frá 1. januar 2013.

Formaðurin í Føroya Kommunufelag, Asbjørn Djurhuus, sigur, at fundurin mikudagin var væl møttur, og ymiskar meiningar vóru um tilmælið hjá arbeiðsbólkinum.

23 kommunur eru limir í Føroya Kommunufelag, meðan KSF, Kommusamskipan Føroya, hevur sjey limakommunur, sum eru Tórshavnar Kommuna, Klaksvíkar kommuna, Fuglafjarðar kommuna, Runavíkar kommuna, Vágs kommuna, Tvøroyrar kommuna og Sands kommuna.

Samlaða talið av kommunum í Føroyum er 30 og hinar allar, sum ikki eru limir í KSF, eru limir í Føroya Kommunufelag.

### Geva frið

- Vit vóru samd um at geva landsstýrinum frið at viðgera uppskotið. Vit halda eisini, at eindirnar mugu vera størri, enn tær eru í dag, um kommunurnar skulu verða førar fyri at átaka sær størri uppgávur sum eitt nú fólkaskúlan og eldraøkið.

Asbjørn Djurhuus sigur, at stórur ivi var á fundinum um, hvørt ein samanlegging letur seg gera so skjótt, sum arbeiðsbólkurin skjýtir upp, tí tað verður nógv, sum skal fáast upp á pláss, áðrenn nøkur samanlegging kann fara fram.

- Umboðini fyri kommunurnar, sum eru limir í Føroya Kommunufelag, vildu heldur sæð, at møguligar samanleggingar verða sjálvbodnar enn tvungnar við lóg. Flestu umboðini halda eisini, at høvdu kommunurnar fyrst fingið økir at umsitið, høvdu tær eisini funnið saman í samstarvi, sum síðan kundi ført til sjálvbodnar samanleggingar, sigur Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya Kommunufelag.

# Almennu skipini skulu rinda havnagjald



*Føroya Kommunufelag er ikki sinnað at lata skipini hjá tí almenna liggja við bryggju – ókeypis*

**- Nógvar kommunur hava gjørt stórar íløgur í havnir, og vit duga einki skeivt at síggja í, at eisini skipini hjá tí almenna skulu rinda havnagjald, heldur Føroya Kommunufelag**

HAVNAGJALD

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á fundi í Føroya Kommunufelag mikudagin hevði felagið til ummælis uppskotið hjá fiskimálaráðnum um havnagjøld við meira.

Uppskotið leggur upp til, at skip hjá tí almenna, eitt nú strandfaraskip og skipini hjá Fiskiveiðieftirlitinum, skulu sleppa undan at rinda havnagjald.

### Skulu gjalda

Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya Kommunufelag, sigur, at felagið onga orsøk heldur vera til, at munur verður gjørdur á skipum hjá tí almenna og øðrum skipum.

Hann vísir á, at øll skip skulu viðfarast eins, og tí heldur felagið tað ikki vera rætt at pilka nøkur skip burtur úr, sum ikki skulu rinda havnagjald.

- Nógvar kommunur hava gjørt stórar íløgur í havnir, og vit duga einki skeivt at síggja í, at eisini skipini hjá tí almenna skulu rinda fyri ta tænastu, tey fáa, sigur formaðurin í Føroya Kommunufelag, Asbjørn Djurhuus.